## Vil aftur út í Europa

Fulham stóð fyri einum óvanligum avriki, tá ið felagið í farnu viku vann heili 4-1 á Juventus í Europa League. Tað hevur givið venjaranum Roy Hodgson blóð á tánna. Hann vil nú raðfesta FA Cup og Europa League hægst fyri at sleppa aftur í Europa at spæla næsta kappingarár. Fulham liggur miðskeiðis á stigatalvuni í Premier League, og megnar neyvan at náa europeisku plássunum í deildini.



## Trívist í Chelsea

31 ára gamli Nicolas Anelka er fegin um at spæla fyri enska felagið Chelsea, og hann er sinnaður at halda fram í felagnum í fleiri ár afturat. – Í árunum millum 25 og 39 finnur tú ofta títt heim, og eg kenni meg heima í Chelsea. Eg havi ikki fyri neyðini at fara aðrastaðni at spæla, og tí eri eg eisini sinnaður at leingja sáttmálan við Chelsea, sigur Anelka, sum er blivin 31 ára gamal, og hevur spælt í Chelsea síðani 2008.

# vndu seg



Brian Kerr saknar, at Gunnar Nielsen spælir fleiri dystir, men vísir tó á, at Gunnar væl og virðiliga er fyrsta val á landsliðnum nú. – Gunnar hevði ongar møguleikar við málunum, metir landsliðsvenjarin eftir ósigurin á Íslandi í gjár

Savnsmynd: Kjartan Þorbjörnsson/Morgunblaðið

Men føroyingarnir vóru ikki nakað serliga neyvir. Bara ein roynd rakti málið, og tað var tá Bogi Løkin skeyt bóltin úr høgru ímóti málinum hjá íslendingum, men tí tók málverjin sær av.

Fleiri skiftingar vórðu gjørdar í seinna hálvleiki, og tá komu millum aðrar, Súni Olsen og Atli Gregersen, sum annars hava verið fastir menn hjá Brian Kerr, inn á vøllin.

### Eitt vanligt tap

Hóast Føroyar í hesum dystinum inni í høllini í Kópavági høvdu bóltin rættiliga fitt, og eisini megnaðu at gera fleiri ting, so var hetta skerda føroyska landsliðið ikki ført fyri at gera meira, enn vit ofta uppliva við landsliðinum. At tapa 2-0 ímóti Íslandi er sjálvandi ikki nøkur katastrofa, og tí verður hetta helst ein dystur, sum vit gloyma rættiliga skjótt, hóast teir tríggir Rógvi Poulsen, Jóan Símun Edmundsson og Høgni Zachariasen fingu sín fyrsta dyst frá byrjan í einum landsdysti nakrantíð.

## FAKTA

**Ísland-Føroyar 2-0 (2-0)**
**1-0:** Matthias Vilhjálmsson, 10.
**2-0:** Kolbeinn Sigþórsson, 37.
**Ísland:** Gunnleifur Gunnleifsson (Fjalar Þorgeirsson, 46.) – Skúli Jón Friðgeirsson (Guðmundur Reynir Gunnarsson, 89.), Jón Guðni Fjóluson, Valur Fannar Gíslason, Arnór Sveinn Aðalsteinsson – Guðmundur Kristjánsson, Matthías Vilhjálmsson (Baldur Sigurðsson, 49.), Bjarni Guðjónsson – Steinþór Freyr Þorsteinsson (Atli Guðnason, 77.), Kolbeinn Sigþórsson (Alfreð Finnbogason, 84.), Jóhann Berg Guðmundsson (Óskar Örn Hauksson, 65.)
**Føroyar:** Gunnar Nielsen – Jónas Tór Næs, Egil á Bo (Atli Gregersen, 65.), Vagnur Mohr Mortensen, Høgni Zachariasen (Einar Hansen, 72.) – Rógvi Poulsen, Atli Danielsen (Súni Olsen, 46.), Fróði Benjaminsen, Símun Samuelsen (Christian R. Mouritsen, 79.) – Bogi A. Løkin (Andrew av Fløtum, 72.), Jóan Símun Edmundsson (Bárður Olsen, 79.).
**Dómari:** Claus Bo Larsen
**Linjudómarar:** Gunnar Sverrir Gunnarsson og Einar Sigurðsson

# Ynskir fleiri landsdystir

**Fróði Benjaminsen, liðskipari á føroyska fótbóltslandsliðnum hjá monnum, saknar fleiri landsdystir, men heldur tó, at eftir umstøðunum gjørdi landsliðið tað gott í gjár**



eij@sosialurin.fo

Eirikur í Jákupsstovu

– Vit skuldu gjarna spælt fleiri landsdystir, so vit kundu verið betur samanspældir, sigur Fróði Benjaminsen, liðskipari á landsliðnum, eftir tapið ímóti Íslandi.

Tó heldur hann, at orsøkin til, at føroyska landsliðið ikki var heilt í essinum til landsdystin í gjár, mest hevur við at gera serligu umstøðurnar við kava í Føroyum í vetur.

– Vit skuldu gjarna verið klárir til dyst hesa tíðina á árinum, men mann hevur ikki spælt so nógv sum mann plagar at gera av kavanum, sum hevur verið, og tí er árið í ár heilt serligt, heldur liðskiparin á landsliðnum.

Um sjálvan dystin sigur Fróði Benjaminsen, at leikararnir gjørdu tað teir kundu: – Vit spældu fult upp við teir, men tað er ikki so nógv at siga, tá mann tapir 2-0. Høvdu vit verið eitt sindur hepnari og tóku okkara møguleikar, so kundi verið øðrvísi, sigur hann.

Spurdur, hvør munurin var millum liðini í gjár, er liðskiparin avgjørdur: – Teir tóku sínar møguleikar, men tað gjørdu vit ikki, so vit mugu í hvussu so er blíva betri at gera mál, sigur Fróði Benjaminsen.

# Klandur um leikarar

**Fríggjadagin og aftur í gjár hevði Brian Kerr hug at leggja eftir føroysku liðunum at mangla respekt fyri landsliðnum. Serliga harmast hann støðuna við Víkingi. – Vit høvdu fyrireikað eina venjingarlegu, og tá eg komi heim, eru bara seks dagar til ein truplan útidyst í steypakappingini, sigur Jógvan Martin Olsen, venjari hjá Víkingi**

– Vit hava havt gott samstarv frá liðunum í Onglandi og Danmark. Ikki øll liðini í Føroyum hava – má mann siga – verið eins góð at samstarva við.

*Hvat meinar tú við tí?*

– Víkingur er eisini í Íslandi, og teir spæla nakrar dystir, og vit fáa ikki Súna og Atla í hópin fyrr enn sunnudagin, so tað er ikki ideella støða, segði Brian Kerr, landsliðsvenjari, við tíðindini hjá Rás2 fríggjadagin.

Sunnudagin helt Brian Kerr fram á sama hátt, og greiddi frá um leikarar, sum spældu 90 minuttir hósdagin og onkur fríggjadagin, og hann metir, at hetta ikki er nakað, sum kann bjóðast einum landsliðið.

Jógvan Martin Olsen, venjari hjá Víkingi, sigur seg væl kunna seta seg inn í støðuna viðvíkjandi Atla Gregersen og Súna Olsen, men sigur seg hava sítt at hugsa um.

– Vit høvdu fyrireikað eina venjingarlegu fyri langari tíð síðan, og brádliga kemur Fótbóltssambandið við einum landsdysti. Eg havi eina rúgvu av skaddum leikarum og fleiri leikarar eru farnir úr hópinum, og mánadagin, tá vit koma aftur til Føroya eru bara seks dagar til ein truplan útidyst í steypakappingini. Tað er mín veruleiki, sigur Jógvan Martin Olsen, sum eisini er fyrrverandi landsliðsvenjari og dugir at seta seg inn í støðuna hjá Brian Kerr.

– Eg rokni ikki við, at hann meinar nakað ilt við hasum, og eg skilji hann væl, men nú síggi eg tingini frá einum øðrum sjónarhorni, tí nú eri eg klubvenjari, sigur Jógvan Martin Olsen, sum leggur afturat, at hann og landsliðsvenjarin hava verið í samskifti um leikararnar, og hann helt, at teir høvdu fingið eina støðu, sum báðir høvdu góðtikið.

-eij